Nærkast eini loysn í Atlantis

Umsitingin hjá Klaksvíkar kommunu arbei›ir nú vi› einum ítøkiligum uppskoti, sum er vi›mælt av b‡rá›num

EY›UN KLAKSTEIN

Klaksvík: Nú nærkast ein loysn á vi›urskiftunum í mentanarhúsinum Atlantis í Klaksvík. Húsi› hevur ikki virka› sum veruligt mentanarhús í meira enn eitt ár, og fíggjarligu vi›urskiftini rundan um húsini hava veri › fløkt.

Í juli mána›i vi›gjørdi Klaksvíkar b‡rá› Atlantis, og tá var› avgjørt, at umsitingin skuldi arbei›a vi› at finna eina loysn. Hendan loysnin er nærri, og í løtuni vi›ger umsitingin uppskoti› saman vi› Klaksvíkar Sjónleikarfelagi og Nor›oya Sparikassa.

Ætlanin er at gera ein sjálvsognarstovn, sum skal reka Atlantis. Ein dagligur lei›ari skal setast, og hann skal syrgja fyri at Atlantis aftur skal spæla ein t‡›andi leiklut í mentanarlívinum í Klaksvík.

Mótbur›ur

Ta› var í august mána›i fyri trimum árum sí›ani at umbygda mentanarhúsi› Atlantis í Klaksvík lat upp. Fimm mána›ir og næstan tríggjar milliónir eftir at fari› var› í holt vi› at umbyggja húsi›, stó› ta› klárt at taka í n‡tslu.

Húsi› var sera snotiligt, tá ta› lat upp. Ta› skuldi ver›a ein mi›depil fyri mentan í Nor›oyggjum, og í húsinum var eisini n‡ggjur biografur, sum skuldi gera kvøldini hjá klaksvíkingum styttri.

Men eftir eina hugaliga byrjan kom mótbur›urin. Rá›ini vóru ikki til at hava ein dagligan lei›ara, biografvirksemi› lei› undir einum tungum rakstri, og so vi› og vi› fækka›ust tilbo›ini í húsunum.

Seinasta ári› hava onkur tiltøk veri› í Atlantis, men ta› hevur fyrst og fremst veri› Klaksvíkar Sjónleikarfelag, sum hevur brúkt húsi›. Ta› brei›a útbo›i› av mentanartiltøkum enda›i vi› gó›um sjónleiki, men so líti› meira.



Mentanarhúsi› Atlantis í Klaksvík skal fáast at virka aftur sum veruligt mentanarhús, og ein loysn á trupulleikunum í húsunum er nú í eygsjón

N‡ggi barnagar›urin seinka›ur tveir mána›ir

Tey 48 n‡ggju ansingarplássini í Klaksvík ver›a ikki tøk fyrr enn sí›st í november mána›i

EY›UN KLAKSTEIN



Klaksvík: Klaksvíkar kommuna roknar vi› at undirskriva sáttmálan um húsini, sum skulu brúkast til n‡ggja barnagar›in vi› Kjalarvegin um stutta tí›, og so kann farast undir at gera n‡ggja barnagar›in kláran.

– N‡ggi barnagar›urin í Klaksvík, sum skuldi fara at virka frá 1. oktober, ver›ur væntandi klárur sí›st í november mána›i. Húsini eru í gó›um standi og tí skal ikki nógv til at gera tey klár sum barnagar›, sigur Jógvan Lützen

Men barnagar›urin ver›ur seinka›ur einar tveir mána›ir, og tey ansingarplássini, sum skuldu vera tøk frá 1. oktober, ver›a í fyrsta lagi klár 20. november.

Orsøkin til hetta er, at ta› hevur gingi› longri tí› enn ætla› vi› at fáa sáttmála um hús og grundøki upp á pláss, men nú er líkt til, at arbei›i› vi› hesum fer at koma á mál.

Í gó›um standi

Tá formligu vi›urskiftini eru fingin upp á pláss vi›víkjandi barnagar›inum, ver›ur fari› í holt vi› at gera húsini klár til at h‡sa teimum 48 børnunum. 60 pláss eru í barnagar›inum, men byrja› ver›ur vi› 48 børnum. 24 ver›a í vøggustovuni og 24 í barnagar›inum.

- Húsini eru í gó›um standi, og tey eru væl gjørd, og tí er ta› ikki naka› umfatandi arbei›i›, sum skal gerast fyri at fáa tey klár til barnagar›, sigur Jógvan Lützen, forma›ur í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar kommunu.

- Brunaumsjónin hevur kravt r‡mingarveg, og okkurt skal sjálvandi gerast til børnini uttan um húsini, men vit vóna, at alt hetta ver›ur gjørt til umlei› 20. november, sigur Jógvan Lützen.

Fleiri pengar

Kommunurnar hava yvirtiki› barnaansingarøki, og frá 1. juli sluppu kommunurnar afturfyri undan nøkrum sosialgjøldum til landi›.

Hetta hevur havt vi› sær, at Klaksvíkar kommuna í ár hevur 2,2 milliónir krónur at rá›a yvir, og hesar ver›a brúktar til n‡ggja barnagar›in.

Næsta ár fer umskipanin at merkja, at 3,6 milliónir fleiri enn í fjør eru hjá Klaksvíkar kommunu at rá›a yvir.

Rani Nolsøe stillar upp

Kendi tónleikarin ver›ur eitt av valevnunum til b‡rá›svali› í Klaksvík

EY›UN KLAKSTEIN

Klaksvík: Hóast listin hjá Tjó›veldisflokkinum til b‡rá›svali› í Klaksvík ikki er endaligur enn, er ta› greitt, at eitt av n‡ggju valevnunum á listanum ver›ur Rani Nolsøe.

Tónleikarin, sum er best kendur frá tiltikna bólkinum Frændur, fer tí fyri fyrstu fer› at taka lut í tí lokalpolitiska lívinum upp undir kom andi b‡rá›sval.

Tjó›veldisflokkurin hevur havt tveir uppstillingarfundir, og í gjárkvøldi› skuldi tri›i fundurin ver›a. Tá skuldi listin ætlandi gerast li›ugur, og sum vit hava skilt, ver›ur Rani Nolsøe eitt av valevnunum.

Rani Nolsøe er havnar- og menningarstjóri í Klaksvík.

Rani Nolsøe ver›ur eitt av valevnunum til b‡rá›svali› í Klaksvík í heyst